| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>18. mars 2010 | Blað nr.:<br>**8436** |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato: 18. mars 2010 kl. 17.00**
**Stað: Býráðssalurin**
**Málsnr: 36/10-47/10**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Elin Lindenskov
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Maria H. Olsen
Annfinn Brekkstein
Vagnur Johannesen
Levi Mørk
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Bjørgfríð Ludvig
Randi Frederiksberg
Tróndur Djurhuus

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**37/10** **2010-0177**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 18. mars 2010:** Tikið til eftirtektar.

**38/10** **2010-0610**

**Visjón og framtíðarmynd**

Málið verður lagt fram á forfundi til býráðsfundin.

**Býráðið 18. mars 2010:** Býráðið hevur einmælt samtykt soljóðandi orðing til visjón og framtíðarmynd fyri høvuðsstaðin:

**Okkara høvuðsstaður - virkin og vakin**

**Vakstrardepil í Norðuratlantshavi**

1. Vit vilja, at høvuðsstaðurin er alheimsgjørdur og fjølbroyttur. Her skal verða rúm fyri ymiskum áskoðanum, hugskotum og mentanum, tí soleiðis verður gott hjá øllum at liva, búgva og virka
2. Vit vilja, at høvuðsstaðurin er livandi, við upplivingum og avbjóðingum, men eisini við tryggleika og nærleika
3. Vit vilja, at høvuðsstaðurin er virkin, við nýggjum og mennandi útbúgvingartilboðum og dygdargóðum altjóða granskingarumhvørvi.

4. Vit vilja, at høvuðsstaðurin er burðardyggur búskaparliga, sosialt og umhvørvisliga
5. Vit vilja, at høvuðsstaðurin gevur nýggjum og altjóða vinnum, og vinnum, sum hava djúpar røtur her, góð vakstrarlíkindi
6. Vit vilja, at høvuðsstaðurin er effektivur og framtakshugaður, við skjótari og góðari tænastu til borgarar og vinnu
7. Vit vilja, at høvuðsstaðurin tænir øllum føroyingum í avgerandi leikluti sínum at ganga á odda í menningini
8. Vit vilja samstarva breitt innan- og uttanlands um at menna høvuðsstaðin

## Okkara høvuðsstaður – virkin og vakin
## Framtíðarmyndin og fremstu fortreytirnar

### Okkara høvuðsstaður – miðdepilin í menningini

Búskaparvøkstur og fólkavøkstur í Føroyum eru avgerandi. Eingin møguleiki er at standa í stað. Verður eingin fólkavøkstur, kann skjót minking gera av við livimøguleikarnar, tí fólk fer hagar, fólk longu er.

Føroyar eru í harðari kapping við onnur samfeløg um alt tað tilfeingi, sum skal tryggja vøkstur og trivnað í framtíðini. Hetta tilfeingið er fyrst og fremst útbúgvið og skapandi fólk. Hesi fólk fara hagar, sum teirra líkar longu eru, og tí eru væl mentir metropolar væl fyri í kappingini.

Tað merkir kortini ikki, at stóru metropolarnir eru einasti møguleikin. Føroyar kunnu verða ein heilt serligur blettur í heiminum, sum kann standa summum fremst í huga vegna sínar serligu dygdir. Okkara fremsta aktiv er okkara egna fólk, men uttan millumtjóða samstarv og íkast frá fólki uttaneftir er framtíðin ikki bjørt. Tað besta vit kunnu gera, er at gera hetta pinkusamfelagið so attraktivt sum til ber fyri tey, sum búgva her, eins og fyri tey, sum kunnu hugsast at búseta seg her.

Vit eiga øll høvuðsstaðin. Hann eigur avgerandi leiklutin at ganga á odda í vinnuligu, búskaparligu, mentanarligu og sosialu menningini í Føroyum, og hann tænir øllum føroyingum. Gott samskifti og ferðasamband tryggja, at høvuðsstaðurin ikki er fjarur frá nøkrum føroyingi, men heldur grannabýurin hjá øllum landsins borgarum, sum bjóðar øllum at lyfta uppgávurnar í felag.

### Fortreytir fyri menning

*Kunnleika, altjóða samstarv* og *trivnað* meta vit saman við virkisfýsni at vera fremstu fortreytirnar fyri, at menningin av føroyska samfelagnum kann eydnast væl. Høvuðsstaðurin skal tryggja, at Føroyar kunnu kappast við metropolarnar í grannalondunum um hesar fortreytir – og soleiðis eisini um tey komandi ættarliðini.

Kunnleiki og førleikar eru hópaðir í tí menniskjatilfeingi og teirri sosialu organisatión, sum gerst alsamt meira avgerandi grundarlagið undir lívførari virðisskapan. Samfeløg, sum meðvitað og við dirvi gera íløgur í kunnleika og førleikamenning fara at hava bestu úrslitini. Altjóða integratión er sjálv farleiðin, sum skal flyta okkum hendur, hugskot, førleika og kapital uttaneftir, ið fara at hava avgerandi týdning fyri nýskapan og tillaging. Altjóða samstarv gerst beinleiðis integratión, tá regluverk, tøkni og kunnleiki her heima eru eins og tey eru í mest framkomna partinum av heiminum. Trivnaðurin fevnir m.a. um tað blíða, forvitna og fevnandi tolsemið, sum setur ymisk fólk í samband við hvørt annað. Trivnaður er eisini alt tað natúrliga, arkitektoniska og sosiala rúmið, sum føroyingar skulu hava at virka í.

**Framtíðarmyndin**

Vit ímynda okkum okkara høvuðsstað sum eina miðstøð fyri lærdómssetri og vinnumenning. Á úrvaldum økjum skara lærustovnar okkara so framúr, at eisini lesandi, undirvísarar og granskarar uttaneftir leita sær hendaveg at taka lut í bæði skúlaskapi, gransking og vinnumenning.

Við støði í vitan, vinnuligum royndum, góðum førleikum og sterkari mentan blóma fyritøkur og arbeiðspláss innan nýggjar vinnugreinar kring skúlaumhvørvið og universitetið, sum seta sær stór mál og leggja dent á skapan, íverkseting og handilsskap. Í kjalavørrinum av tí blóma framkomnar stuðulstænastur og tænastur, sum fremja lív millum bæði íbúgvar og vitjandi. Í okkara høvuðsstaði eru gróðrarlíkindini tí góð hjá bæði nýggjum vinnum, fyritøkum uttaneftir og virkjum, sum hava djúpari røtur her. Hesar vinnur røkka sjálvt teimum fjarastu marknaðunum kring knøttin. Eitt sterkt vinnulív leggur soleiðis lunnar undir framburð og vælferð.

Høvuðsstaðurin hevur ein bæði sterkan og tiltiknan mentanarpall, sum á mongum økjum kappast við umheimin í dygd, um enn ikki í vavi. Tónlist, myndlist, leiklist og onnur list blóma á ein hátt, so bæði leikfólk og úrmælingar kunnu troyta sína skapanargleði og menna síni evni. Umstøðurnar at spæla leikir og hava konsertir skara framúr í dygd, sniði og originaliteti í góðum samsvari við allan høvuðsstaðin. Tær savna allar føroyingar og gera okkum ernar, og tær draga at sær bæði gitin listafólk og kræsið publikum uttan úr heimi. Sama ger seg galdandi innan ítróttina.

Alt hetta kemst av, at í okkara høvuðsstaði búgva og virka lið um lið allir samfelagsbólkar, øll ættarlið og fólk úr nógvum ymiskum londum. Ungdómurin er

sjónligur í býarmyndini, og alskyns tungumál hoyrast á gøtuni. Vit hava valt at búgva her, tí at her eru nakrir spennandi og øðrvísi møguleikar. Í okkara høvuðsstaði trívast øll, sum - hvør við sínum gávum - ynskja at menna Føroyar, sama um tey altíð hava búð her, eru heimafturkomnir útisetar ella einaferð hava verið fremmandafólk.

Eitt fevnandi tolsemi og eitt opið forvitni knýtir bond millum okkum øll, sama hvussu ymisk, vit eru, og uttan mun til, hvussu vit velja at skipa okkara sosiala lív. Tað er hetta umhvørvið, sum styrkir og mennir tey mentanarligu virðini eins væl og tey vinnuligu. Øll kenna seg eins trygg, fræls og eggjað til skapan. Okkara høvuðsstaður skarar framúr, tá tað ræður um at hýsa ymiskleikunum.

Til tess at rúma hesum er okkara høvuðsstaður væl umhugsaður og skipaður í einum strembandi býarplani við samanspæli millum vakran og spennandi arkitektur, eina livandi miðbýarkjarnu, ein væl varðveittan gamlan býarpart og náttúruna. Við einum ósvikaligum og framtíðartryggjaðum undirstøðukervi er hann eisini væl knýttur at restini av landinum og umheiminum – bæði ferðsluliga og elektroniskt. Afturat estetikkinum og miðvísa logistikkinum umboðar hann eisini burðardygd, bæði búskaparliga, sosialt og umhvørvisliga. Hetta skapar borgarunum trivnað, vinnuni gróðrarlíkindi og okkara høvuðsstaði og landinum øllum sóma og gott altjóða umdømi.

**39/10** <u>**2009-3026**</u>

<u>**Ásetan av fundardøgum býráðsins fyri 2010**</u>

Uppskot frá umsitingini til fundadagar:

| | |
|---|---|
| 28. januar | 24. juni |
| 25. februar | 16. september |
| 18. mars | 21. oktober |
| 22. apríl | 18. november |
| 20. mai | 16. desember |

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

- Fundurin 22. apríl og 18. november verður avlýstur. Ístaðin verður eyka fundur 20. apríl og 25. november 2010.

**Býráðið 18. mars 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**40/10** **2009-0718**

**Bátapláss á Gomlurætt.**

Havnin á Gomlurætt er ein landshavn, sum verður umsitin av Landsverk.

Umleið 9 bátar, sum í høvuðsheitum eru heimahoyrandi í Kirkjubø/Velbastað, hava ligið fyri teym á Gomlurætt, sum teir sjálvir hava lagt út og uttan góðkenning frá Landsverk.

Landsverk hevur givið boð til bæði teir bátarnar sum standa á landi, og teir sum liggja fyri teym, um at teir skulu flyta burtur.

Tað eru 20 bátar úr Kirkjubø/Velbastað/Norðadali, sum hava søkt um bátapláss, og sum standa á bíðilista.
Av teimum 20 bátunum, eru tað 5 bátar, sum nú liggja á Gomlurætt.
4 bátar, sum antin liggja við teym ella standa á landi, hava onga umsókn um bátapláss.

Sum ein fylgja av at bátarnir eru vístir burtur, hevur samskifti verið við Landsverk, hvat ein møgulig loysn kundi verið.

Úrslitið av samráðingunum við Landsverk eru m.a. at:

- Tórshavnar kommuna kann leggja flótibrúgvar út, so pláss er fyri umleið16 báteplássum
- At 25 ára leigusáttmáli verður gjørdur
- At leigumálið eisini umfatar umleið 3.000 m$^2$ á landi.
- At Tórshavnar kommuna ger allar neyðugar íløgur og viðlíkahald
- At árliga leiguupphæddin, íroknað bátabrúnna til ferðafólkabátar, sum áður er løgd út, verður kr. 60.000,-

Inntøkurnar fyri útleigu av 16 bátaplássum er mettur til kr.32.000,- árliga

Íløgan í bátaplássini er lutfalsliga lítil, tí vit kunnu leggja bátabrúgvar í eina verðandi havn, men koma útreiðslurnar so ístaðin sum leigukostnaður til Landsverk.

Tað er stórur munur á flóð og fjøru á Gomlurætt, og tað ger tað kostnaðarmikið at gera ein fasta brúgv, og verður tað tí mett, at fragasta loysnin er at leggja flótibrúgvar út.

**Íløgukostnaður:**

| | | |
|---|---|---|
| Flótibrúgvar, landgongd, rekverk, skinnari | | 310.000,- |
| Útlegging og festir | 100.000,- | |

| | | |
|---|---|---|
| Bátabummar | 8 stk | 100.000,- |
| Burturbeining av mola og vegur | | 50.000,- |
| Ljós, vatn og óvantað | | 100.000 |
| Samlaður íløgukostnaður | | 660.000,- |

Um økið á landið, sum liggur upp at bátaplássunum og er umleið 3.000 $m^2$ , skal brúkast til at seta bátar á, er neyðugt at planera, drena og asfaltera økið, og er tað tá mett at kosta kr.900.000,-.

Tað er Tórshavnar kommuna, sum fíggjar íløgur í bátahavnir meðan tað sambært kommunustýrisskipanini er Tórshavnar havn, sum stendur fyri rakstrinum av bátahavnum, sum skal hvíla í sær sjálvum.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at taka undir við uppskotinum til leigusáttmála við Landsverk, og at leiguútreiðslurnar verða goldnar sum ein partur av íløgukostnaðinum til bátahavnir.

Eisini verður mælt til at játta kr. 660.000,- til íløgur í flótibrúgv við bummum, og at plássini verða, í fyrsta lagi, leiga til umsøkjarar úr Kirkjubø, Velbastað, Syðradali og Norðadali, eftir aldri á innkomnum umsóknum.

**Havnarnevndin 15. mars 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini at fíggja av konto 90.

**Býráðið 19. mars 2009:** Einmælt samtykt.

- Annfinn Brekkstein heitir í skrivi, dagfest 28. oktober 2009, á havnarnevndina, um at gera eitt 150- til 200 $m^2$ stórt øki á Gomlurætt til viðlíkahald av bátum.

Fyri ikki at dálka umhvørvið, verður víðari skotið upp at gera eina afturlatna reinsiskipan, har ein uppsamlingstangi verður tømdur eftir tørvi.

Viðmerkingar:
Um ein afturlatin uppsamlingsskipan verður gjørd, merkir tað, at eisini regnvatn verður uppsamlað, og tí er tað neyvan nøkur góð loysn.
Tað eru 20 bátapláss á Gomlurætt, har nakrir av bátunum eru smáir og verða drignir upp á bátadráttin á Velbastað.
Fleiri av bátunum, sum lógu á Gomlurætt áðrenn brúgvarnar blivu lagdar út, brúktu bátaplássið í Álakeri ella á Argjum.

Tíðin, har bátar kunnu standa á landi ókeypis, er avmarkað, og tí er altíð pláss at brúka verðandi økir á Argjum og í Álakeri.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður frá at gera upphivingar pláss á Gomlurætt. Víst verður ístaðin til plássini á Argjum og í Álakeri.

**Havnarnevndin 7. desember 2009:** Samtykt at kanna málið nærri til ein seinni fund.

-Fyri at lúka umhvørvistreytirnar, er neyðugt at gera sandfang og oljuútskiljara, og er uppskot til hetta góðkent av umhvørvisdeildini hjá Tórshavnar kommunu.

Kostnaðurin fyri at gera eitt 300 $m^2$ asfalterað øki, sum lúkar umhvørvistreytirnar um frárenning, er mettur til kr. 200.000,-

Í fíggjarætlanini fyri 2010 hjá Th, eru kr. 315.000 avsettar til umvælingar. Um økið á Gomlurætt verður fíggjað av nevndu kontu, ber ikki til at gera neyðugar umvælingar í 2010. Hettar er helst at rokna sum ein íløga.

Tað er Tk, sum stendur fyri íløgum í smábátahavnir/smábátapláss.

**Havnarnevndin 15. februar 2010:** Samtykt at mæla til at fremja arbeiðið, og at heita á býráðið, um fíggjarnevndina, at finna fígging av íløgum 2010.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 200.000,- av framfluttari játtan á undirkonto 7476 - Íløgur í smábátahavnir - at gera eitt 300 $m^2$ asfalterað øki, sum lýkur umhvørvistreytirnar um frárenning.

**Býráðið 18. mars 2010:** Einmælt samtykt.

**41/10** **2010-0546**

**Framfluttar játtanir frá 2009 til 2010**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at roknskapurin fyri 2009 verður gjørdur upp, verður eisini gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta til 2010.

Hesar skulu játtast í býráðnum sum eyka játtan. T.v.s. við tveimum viðgerðum.

Yvirlitið verður lagt fram saman við fyribils roknskapinum fyri 2009.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta framflyting av t.kr. 4.879, netto, til rakstur og t.kr. 136.103, netto, til íløgur.

**Býráðið 18. mars 2010:** Einmælt samtykt.

**42/10** **2010-0544**

**Uppskot til raðfesting av íløgum á konto 6275 fríðkan av býnum og konto 6575 kirkjugarðar**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
**Íløguætlanaruppskot 2010:**
**Vísandi til fíggjarkarmin, sum samtyktur varð í býráðnum tann 26. november 2009, so eru tøkar til íløgur tils.: 5,0 mill.**
Býttar soleiðis:
6.11.32.111 Fríðkan av kommununi (Løguj.) 3.000
6.24.51.111 Kirkjugarðar (Løguj.) 2.000

Til fundirnar í ymisku býráðsnevndunum í fíggjarætlanartilgongdini, varð framløgd niðanfyri standandi raðfesting. Við hesum verður biðið um, at nevndin góðkennir og staðfestir raðfestingina.

Konto 6275 íløgur fríðkan av býnum

| Jour.nr. | Arbeiði | Kostnaður |
|---|---|---|
| 2009-3144 | Nólsoy, gøta frá skúlanum til dagstovnin | 120.000 |
| 2009-3143 | Ùtvegan/keyp av tilfari til gøtur | 200.000 |
| 2009-3123 | Viðarlundin í Havnardali- gøtur v.m. | 250.000 |
| 2000-2675 | Viðarlundin í Marknagili-gøtur,mold v.m. | 250.000 |
| 2009-2182 | Sandá- útvegan av lendi til gøtur | 160.000 |
| 2009-1580 | Purku- og Lambagerði fríøki | 350.000 |
| 2006-1384 | Velbastaður úthegn, rørportur v.m. | 500.000 |
| 2009-1992 | Sandá gangibrúgv | 350.000 |
| 2009-2012 | Reinsaríið, tún, trappa v.m. | 700.000 |
| 2009-3139 | Tjarnargarður, skipan av túni, stakitt,planting | 120.000 |
| | **Samanlagt** | **3.000.000** |

Konto 6575 íløgur kirkjugarðar

| J.our.nr. | Arbeiði | Kostnaður |
|---|---|---|
| 2004-0061 | Skipan av B2/B3 við miðøki, gøtum, grótgarði | 1.370.000 |
| | Garður móti ringvegnum | 400.000 |
| | Stuðlagarður við gravarahúsið | 50.000 |
| | Projektering eftirlit | 180.000 |
| | **Samanlagt** | **2.000.000** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla teknisku nevnd til at taka undir við raðfestingini, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Nevndin samtykti at mæla til, at játta kr. 700.000 til gerð av uttanumsøkinum kring Reinsaríið (j. nr. 2009-2012), og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina. Samstundis verður heitt á umsitingina um at lýsa omanfyri standandi samlaða uppskot til íløgur fyri 2010 á konto 6275 og 6575, á næsta fundi í byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 18. mars 2010:** Einmælt samtykt.

**43/10** **2005-1183**

**Viðv. matr. nr. 297 - Reinsaríið.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt innleiðandi kanningar av bygninginum á matr. nr. 297.

Endamálið við kanningararbeiðinum hevur verið at gera eina støðismeting av bygninginum, ið skal liggja til grund fyri seinri støðutakan til bæði endamálsorðing og arbeiðsgongd fyri eitt hvørt arbeiði við ognina.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur seinastu tíðina havt í umbúna at væla um omanfyri nevndu ogn. Ognin er áhugaverd. Her er eitt gamalt pakkhús í søguligu Havnini, og hevur Býarsavnið gjørt viðmerkingar til ætlanina at varðveita bygningin.

**Húsasøga**
Við avtøku kongliga handilsins varð m.a. sonevnda "Nýggja Pakkhús" í Vágsbotni (Frederiksvaag) selt á uppboði í 1857.[1] Keyparin var handilshúsið C. F. Siemsen í Hamburg. Skeytið varð lisið sama ár.

Í 1894 seldi keypmaðurin Johannes Hansen, týskur varakonsul, pakkhúsið fyri Siemsen til føroyska handilshúsið M. C. Restorff & Sønner. Konsul Hansen, sum hann kallaðist, var í starvi hjá Siemsen, og seinni keypti hann sjálvur fyritøkuna. Hann myndaði Siemsen í Havn, og harav stavar navnið Hansens pakkhús.

[1] Yvirlit yvir sølu av ognum einahandilsins, sí Mikkjal Helmsdal: ...verjir fyri Havnarvág (Tórshavn 1994), s. 56-60.

M.C. Restorff & Sønner keypti sum sagt ognina í Vágsbotni. Í skeytinum stendur skrivað ymiskt:

*"...en Pakhusbygning, 2 Etager Høj, ca. 30 Alen lang og 16 Alen bred med den tilsammen hørende Tømmerplads, der med den Grund, hvorpaa Pakhuset staar, udgjør en Firkant [...] og hvoraf en østre Del er særskilt indhegnet og Dyrket som Have..."* [2] Konsul Hansen tryggjaði sær rættin til urtagarðin eystan fyri Tórsgøtu, nevnt "Hansens Have" - t.e. í dag parkeringsplássið niðan móti Kommunu-skúlagarðin og 'Fish & Chips'.

Í 1923 seldi M.C. Restorff & Sønner ognina til Thorshavns Mælkeforsyning & Margarinefabrik, Meiaríið. Keypssáttmálin nevnir ognina "Hansens pakkhús".[3] Tey høvdu eitt nú framleiðslu av sápu í pakkhúsinum.[4] Meiaríið helt fram í bygninginum og hevur havt vaskarí og reinsarí fram til 1970-árini. Maria Olsen hevði Reinsaríið í erva til fyri fáum árum síðani, meðan Postverk Føroya hevði eina pakkadeild í neðra.

Tórshavnar kommuna hevur átt bygningin síðani 1986.

**Kanningar av ognini**

Føroya Fornminnissavn hevur áður víst ognini áhuga. Í 1981 gjørdi táverandi savnsarkitekturin Rúni H. Øster eina skitsuuppmáting. Annað er ikki at finna í málinum.

Søgufrøðingurin Ásla Weihe hevur í ritgerð um handilin hjá Ryberg í seinnu helvt 18. aldar við rúgvismiklum skjølum roynt at endurskapa upprunaliga umhvørvið í Vágsbotni. Víst verður til verk Carl Mogensens: Færøske Krønike (1844, seinni útgivið í Tórshavn 1970), at uml. 1820 skal kongligi handilin hava keypt gomlu ognirnar hjá Ryberg *"...hvis Pakhus af 130 alens Længde, var solid bygget af svær pommersk Tømmer, og hvor Handelen, saalænge det stod, stedse havde 1500 à 2000 Tdr. Korn paa Oplag..."*. Víðari vísir Ásla Weihe á eina húsaskrá í 1784, at pakkhúsið var 100 x 15 alin, meðan ein húsaskrá í 1819 sigur, at tá stóð pakkhúsið ikki uppi.

Við støði í 1784-skrásetingini lýsir Ásla Weihe í einum uppskoti, at Vaskaríið, sum vit kenna tað í dag, kann hava verið partur av einum longum pakkhúsi - 100 x 16 alin. T.v.s. at handilin hjá Valdemar Lützen í Vágsbotni (Sosialurin) og norður um verandi Vaskarí hevur verið ein bygningur. Hetta verður undirbygt við skjali hjá amtinum, sum sigur: "*...det for störste Delen kommer til at hvile på Fundamentet af det der forhenstående Pakhus…*" [5]

[2] Føroya Landsskjalasavn: Skøde- og Panteprotokol 1894-1895, nr. 29, s. 90.
[3] Føroya Landsskjalasavn: Skøde- og Panteprotokol 1922-1923, nr. 47, s. 755-756.
[4] Thorshavns Mælkeforsyning og Margarinefabrik 1908-1958 (Tórshavn 1958), s. 20.
[5] Ásla Weihe: Rybergshandilin og Rybergstíðin í Føroyum (Varðin 58, Tórshavn 1991), s. 26-27.

Kanningin hjá Áslu Weihe av umhvørvinum er virðismikil. Við skjølum hevur hon greinað søguliga Vágsbotnshandilin aftur til 1766.

Tað er sjáldsamt við eini húsaogn uppi í tí nýggjara býnum, har søguligu sporini ganga meira enn tvær øldir aftur til tað gamla samfelagið. Hóast pakkhúsið sambært greining Áslu Weihe av Rybergstíðini varð endurreist í 1831, so er slóðin av virknu tíðini hjá Ryberg, frá tí fyrsta átakinum at hava skipaða framleiðslu av fremmandum vørum í Føroyum, kortini sjónlig.

Pakkhúsið er harnæst ein vitnisburður um virksemið hjá kongliga handlinum og hjá eitt av fyrstu útlendsku handilshúsunum í fríhandilstíðini, Siemsen, og síðani hjá eitt av fyrstu stóru føroysku handilshúsunum, Restorff - tá ið Føroyar gjørdust fiskivinnutjóð. Bygningurin hevur v.ø.o. staðið uppi og verið í brúki í fleiri søgulig skeið.

Eru vit lagalig, so siga vit, at aldurin á pakkhúsinum skjótt er 175 ár. Forsøgulig viðurskifti kunnu vit ikki rættiliga fáa skjalfest, men lítið er at ivast í, at pakkhúsið hevur verið partur av handilsumhvørvinum við Vestaruvág seinast í 1700-talinum.

Á Fornminnissavninum eru fotomyndir av pakkhúsinum við flagtekju og tjøraðum klædningi og myndir av bygninginum á leið soleiðis, sum hann sær út í dag. Hesar eru úr savninum hjá myndatakaranum Absalon Joensen og kunnu helst tíðarfestast til 1920-30-árini og fyri vist frá krígnum 1940-1945.

Býarskipanardeildin hevur gjørt fullfíggjaðar uppmátingar av bygninginum og hevur gjørt frágreiðing um støðismeting, kostnaðarætlan og arbeiðsgongd framm yvir.

Arbeiðið verður mett at skula gerast í stigum.

Skotið verður upp at fara undir at taka verandi klæðing frá fyri at sleppa at umvæla og skifta berandi konstruktiónir, haraftrat skal farast undir at klæða og skifta vindeygu og hurðar, sum hoyrandi til 1. byggistig.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at nevndin góðkennir ætlanina, og at nevndin mælir býráðnum, umvegis fíggjarnevndina, til at játta kr. 900.000, til hetta arbeiðið, av íløgunum fyri 2005.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. mai 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 26. mai 2005:** Einmælt samtykt.

**Lýsing:**
Tilboð eru komin inn, dagfest 10. nov. 2006, til klæðing (mál nr.2006-3262/2), skifta vindeygu og hurðar, grevstrararbeiði rundan um Pakkhúsið og ymisk neyðug HVS-arbeiði.

| | | |
|---|---|---|
| Lægsta tilboð hevði Húsavarðartænastan áljóðandi | | |
| | kr. 2.096.370,00 | +MVG |
| Projektering og eftirlit verður mett til | kr. 300.000,00 | + MVG |
| Óvæntað verður mett til 15% | kr. 360.000,00 | + MVG |
| Tilsamans mettur kostnaður uttan MVG | kr. 2.760.000,00 | |
| Tilsamans mettur kostnaður við 6,25%MVG | kr .2.932.500,00 | |

**Tilmæli:**
Býararkitekturin og tekniski stjórin mæla til, at peningurin kr. 2.932.500,00 til hetta arbeiðið verður fíggjaður við 2 mill. kr. av konto 82, sum so skal tillagast, og við 500.000 kr av íløgum fyri fríðkan av býnum, vísandi til at partur av arbeiðinum er í lendinum kring bygningin. Endaliga varð avsettur peningur í 2006, og eru uml. 500.000 kr eftir av hesum at brúka.

Sostatt verður mælt til at mæla býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum, og fíggja tað eftir ávísta leistinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 5. februar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2007:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og mæla býráðnum til at játta kr. 500.000,00 av íløgum.

**Býráðið 22. februar 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Uppískoyti:**
Í álitinum Havnin – livandi, kveikjandi, skapandi – verður skotið upp at gera Tórsgøtu til mentanargøtu í Havn, her eru savnað ymisk mentanartiltøk á einum rímiliga lítlum øki, miðskeiðis í býnum. Í dag er fittur partur av hugskotum at gera Tórsgøtu til mentanargøtu vorðin veruleiki. Niðasti partur av Tórsgøtu er vorðin ein rættur mentanardepil, har vit hava:

Tjóðpall Føroya, Margarinfabrikkina, venjingarhølið hjá Tórshavnar Hornorkestri, Posthúskjallaran. Eisini er samtykt at seta Hansens Pakkhús – betri kent sum Gamla vaskaríið – í stand at nýta til mentanarlig tiltøk.

Fleiri ymisk tiltøk eru staðsett í Tórsgøtu. Eitt tað størsta man vera Asfalt, sum eftir væleydnaða tiltakið í fjør ætlandi veðrur árliga afturvendandi.

Í vár verður fiskivinnustevnan North Atlantic Fish Fair hildin í Havn, og partur av teimum tiltøkum, sum tá verða hildin, verða hildin júst í hesum umhvørvinum.

Nú býráðið hevur samtykt at umvæla ognina verður neyðugt at taka støðu til hvat húsini skulu brúkast til í framtíðini.

**Mentamálanevndin 17. apríl 2007:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina at kanna møguleikarnar at brúka húsini til spælistað hjá tónleikarum og ungdómslistaskúla, og at leggja málið fyri nevndina aftur skjótast gjørligt.

**Mentamálanevndin 15. mai 2007:** Nevndin var á staðnum og hugdi eftir húsunum og grannalagnum.

Samtykt at heita á umsitingina um at gera uppskot til heildarætlan fyri reinsaríið, túnið og bygningarnir rundanum.

**Uppískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 2. oktober 2007:** Útsett.

**Ískoyti:**
Avgjørt at geva fyribils loyvi fram til ólavsøku 2008 at royna niðastu hædd á Hansen´s Pakkhús til tónleikaframførslu. Hetta er góðkent av Brunaumsjón Landsins, sløkkiliðsovastanum hjá Tórshavnar kommunu og tekniska stjóranum. Nakað av trygdarútgerð skal uppsetast og ljós og el-veiting má leggjast inn til bygningin. Hetta er mett at kostað uml. kr. 100.000.

Fyri at koma víðari við fyrireikingunum at gera Hansen´s Pakkhús klárt til varandi nýtslu til almenn endamál, er neyðugt at gera eitt prosjekt um innrætting, ábøtur, innleggingar o.a. í bygningin. Mett er at neyðugt er við uml. kr. 300.000 til at gera skitsuppskot.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi ískoyti mæla kommunustjórin, trivnaðarstjórin og tekniski stjórin til, at játta kr. 400.000 av íløgum fyri 2008 til mentunnarlig endamál, sum eru settar av til Sankta Frans skúla, lutað sundur til á henda hátt:

- at seta upp trygdarútgerð og gera fyribils el-innleggingar v.m. í royndartíðini fram til ólavssøku 2008 – kr. 100.000
- at gera skitsuuppskot til innrætting og nýtslu – kr. 300.000

og at seta samsvarandi upphædd av til Sankta Frans skúla í 2009.

**Mentamálanevndin 17. juni 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka undir við tilmælinum, tó so at skitsuuppskotið til innrætting og nýtslu eisini umfatar túnið og bygningarnar rundanum í samráð við trivnaðarumsitingina.

**Fíggjarnevndin 18. juni 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 19. juni 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ìskoyti**
Sambært samtykt mentamálanevndsins 17. juni, fíggjarnevndsins 18. juni og býráðsins 19. juni 2008 hevur niðasta hæddin í Gamla reinsaríi verið roynd til tónleikaframfrøslu fram til ólavsøku 2008.

Margarinfabrikkin hevur samskipað tiltøkini, sum hava verið. Afturljóð frá tónleikarum og áhoyrarum hava sum heild verið sera jalig, og eftirspurningur eftir at sleppa at halda áfram við hesum royndum, meðan arbeitt verður við projektið um innrætting, ábøtur, innleggingar o.a. á bygningin og túnið rundanum, er stórur. Margarinfabrikkin er jaliga sinnað at halda áfram sum samskipari av tiltakinum, men hevur ikki fíggjarliga umstøður at rinda tað, sum hetta kostar í samsýningum til starvsfólk og vasking, leigu av tónleikaanleggi, vaktarhald v.m., kostnaðarmett til kr. 150.000 árið út.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla fíggjarnevndini til at játta Margarinfabrikkini 150.000 kr. at umsita royndartiltakið, soleiðis at royndirnar kunnu halda áfram, meðan arbeitt verður við projektið um innrætting, ábøtur, innleggingar o.a. á bygningin og túnið rundanum.

**Fíggjarnevndin 2. september 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 150.000 av reguleringskontoini.

Málið verður sent mentamálanevndini til kunningar.

**Mentamálanevndin 17. september 2008:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Tikið av skrá.

**Uppískoyti:**
Mayfinn Norðoy, arkitektur, leggur uppskotið fram og greiðir frá tí.

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Nevndin samtykt at heita á umsitingina at kanna møguleikan at gera kjallahæddina, og onnur neyðug arbeiði í tí viðfanginum.

**Ískoyti:**
Eina tíð hevur tilfar við uppskoti um, hvussu Reinsaríið kann endurnýggjast ligið hjá umsitingini. Mentamálanevndin varð kunnað um innihaldið í uppskotinum, sum Mayfinn Norðoy, arkitektur, hevur gjørt á seinasta fundi.

Viðmerkjast skal, at avmarkaðir møguleikar eru fyri kjallarahæddini, tí fyribilsloyvi er útgingið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

- at mentamálanevndin sum skjótast at gera uttanumøkið og kjallarahæddina í Reinsarínum í høvuðsheitum sambært hesum uppskoti.

- at mentamálanevndin samtykkir at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at játta neyðugan pening til uttanumøkið/tún v.m. av íløgukonto Fríðkan av býnum í ár, har kr. 700.000 eru avsettar til endamálið.

- at mentamálanevndin samtykkir at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at útvega upp til 2,5 mió. kr. av konto 6110 Umsitan av bygningum, til at gera kjallarahæddina í Reinsarínum í ár.

**Mentamálanevndin 10. februar 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vísandi til, at gjørt er skitsuuppskot til innrætting og nýtslu av Reinsarínum, sambært býráðssamtykt frá 19. juni 2008, sum var lagt fyri á fundi í Mentamálanevndini 2. des. 2009, eigur politisk viðgerð av uppskotinum at fara fram í avvarðandi faknevndum og býráðið, og støða takast til uppskotið, áðrenn onnur stig verða tikin. Politisk eigur eisini at verða tikin støða til møguligar broytingar, og hvussu arbeiðið skal fíggjast, um hetta skal setast í verk. Samlaði kostnaðurin av skitsuuppskotinum er mettur til kr. 5.372.400 u. mvg og prosjektumsiting. Hesi viðurskifti eiga at verða avgreidd, áðrenn samtyktin í mentamálanevndini hin 10. febr. 2010 verður framd í verki.

Upplýsast kan, at tekniska umsitingin metir ikki, at heimild er fyri at rinda útreiðslur til hetta arbeiði av konto 6110, vísandi til at talan er um játtan til viðlíkahald av bygningum, og ikki til íløgur í innrætting til broytta nýtslu av bygninginum. Avsettar eru kr. 20.000 til vanligt viðlíkahald av bygninginum, trygging, streymnýtslu í fíggjarætlanini fyri 2010. Eisini kann leggjast afturat, at konto 6110 harumframt hevur hall frá 2009, sum verður framflutt til 2010, og sum skal sparast inn aftur. Sostatt er heldur ikki fíggjarligt rásarúm á konto 6110 til slíkt arbeiði.

Hinvegin eru kr. 700.000 avsettar á einum uppskotið fyri løgujáttan á konto 6275, sum umsitingin legði fyri teknisku nevnd í samband við fíggjarætlanarviðgerðina fyri 2010. Uppskotið er tó ikki endaliga staðfest í avvarðandi faknevndum og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Á hesum grundarlagið mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til,

1. at beina málið um uttanumsøkið/tún í teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið við viðmæli um, at játtað upp til kr. 700.000 av konto 6275 til arbeiði
2. at arbeiði við uttanumsøkinum í høvuðsheitum verður framt sambært tekning hjá umsitingini
3. at mæla Mentamálanevndini til at leggja uppskotið hjá Mayfinn Norðoy, arkitekti fyri avvarðandi faknevndir og býráðið til politiska viðgerð
4. at beina málið um at gera kjallarahæddina aftur í Mentamálanevndina at útgreinað hvat nýtslan skal verða, og hvat skal gerast í kjallarahæddini, og at ávísa fígging, at leggja fyri fíggjarnevndina og býráðið til støðutakan, vísandi til, at konto 6110 er ætla til viðlíkahald og ikki til íløgur, og at fíggjarligt rásarúm heldur ikki er á hesi konto.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2010:** Ein meiriluti Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Levi Mørk samtyktu at beina pkt. 1 og 2 í tilmælinum til teknisku nevnd og býráðið um fíggjarnevndina. Meirilutin samtykti eisini, at umsitingin til næsta fund ger eina ætlan fyri hvussu kjallarahæddin av Reinsarínum kann umvælast til spælistað v.m.

Ein minniluti Jan Christiansen tekur støðu á seinri fundi.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Ein meirluti Marin Katrina Frýdal, Levi Mørk, Bogi Andreasen og Halla Samuelsen, samtykti at mæla til, at beina pkt. 1 og 2 í omanfyristandandi tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina frá 1. mars 2010, í býráðið um fíggjarnevndina, og at vísa til samtyktina í máli nr. 2010-0544.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 18. mars 2010:** Einmælt samtykt.

**44/10** **<u>2010-0349</u>**

**<u>Kloakk: Vestara bryggja – Álaker</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ì sambandi við ” Reinsan av vestaru vág ” vantar nú at kloakkin frá fiskavirkinum verður førd út á opnan sjógv. Ì hesum sambandi hevur Tórshavnar havn latið gjørt eina kanning av viðurskiftunum á økinum á vestaru bryggju.

Saman við arbeiðinum á havnaøkinum, sum Tórshavnar havn stendur fyri, kundi hetta kloakkarbeiðið, ið fevnir um leggjan av kloakkleiðing út á streymasjógv frá Álakeri, verið gjørt í samstarvi við Tórshavnar havn.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Biðið verður um kr. 300.000,00 til projektering og kanningararbeiði og at P/F Martin E. Leo hevur projekteringina um hendi. Teir hava gjørt kanningina fyri Tórshavnar havn.

Kanningararbeiðið skal útgreina kostnaðarmeting av teknisku loysnina at leggja eina høvuðskloakkleiðing út frá fyrrverandi roykivirkinum út á streymasjógv. Harumframt skal ein møgulig umlegging av verandi høvuðskloakkleiðing, ið liggur fram við nýggja hospitalsbygningin hjá Landssjúkrahúsinum.

Umsitingin kunnar um kloakkætlanina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at farið verður undir arbeiðið, og at hetta verður fíggjað av íløgum fyri kloakkir í 2010.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 300.000,- av undirkonto 6875, íløgur í kloakkir.

**Býráðið 18. mars 2010:** Einmælt samtykt.

**45/10** **<u>2006-0769</u>**

**<u>Ætlan um nýggjan kirkjubygning á Argjum.</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Kirkjuráðið á Argjum er komið við fyrispurningi um møguleikarnar at byggja uppí verandi kirkju ella at fáa annað stað at byggja nýggja kirkju á. Eitt uppskot er, at byggja kirkju á sokallaðu ”Cepa trøðna”.

Skjøl:
Umsókn j. nr. 2006-0769/1.
Tekningar j. nr. 2006-0769/2.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, byggi- og býarskipanarnevndin heitir á byggi- og býarskipanardeildina um at ávísa egnaði støð til nýggja kirkju á

Argjum, herundir at meta um hvørt útbygging av verandi kirkju er ein møgulig loysn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. august 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

-Í sambandi við fyrispurning frá kirkjuráðnum á Argjum um framtíðar møguleikar fyri kirkjuna á Argjum, hevur býarskipanardeildin gjørt eitt uppskot til staðseting av nýggjari kirkju á Argjum.

Økið, ið liggur ímillum Støðlagøtu og Sandá omanfyri Spinnaríið, er uml. 4.000 $m^2$ til støddar og er partar av matr nr. 115 og 56a. Sí hjálagda kort dagf. 08.01.08.

Sambært almennu byggisamtyktini liggur økið í umráðispartinum D1, ið er lagdur til *almenning, náttúrufriðingar-og mentunarlig endamál og tilíkt.*

Mentunarlig endamál kann t.d. vera ein kirkja. Vesturkirkjan liggur í einum D1 øki.

Av tí at økið liggur oman ímóti Sandá, er neyðugt at søkja friðingarmyndugleikarnar um undantaksloyvi frá Náttúruverndarlógini §2, sum sigur, at tað ikki eigur at verða bygt nærri áum, ið eru meira enn 4 m breiðar í botninum, uttan loyvi frá friðingarmyndugleikunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, nevndin góðkennir økið til nýggja kirkju á Argjum sambært kortskjali dagf. 08.01.08. og at býarskipanardeildin arbeiðir víðari við málinum. Harumframt skal Friðingarnevndin hoyrast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. januar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. mars 2008:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti 21. august 2008:**
Loyvi er nú givið av friðingarmyndugleikunum til at kirkjan kann leggjast á øki millum Støðlagøtu og Sandá omanfyri Spinnaríið soleiðis sum skotið upp av býarskipanardeildini og góðkent av Byggi- og býarskipanarnevndini tann 14. januar 2008.

Neyðugt er nú at taka støðu til, hvønn prís lendi skal seljast fyri.

Upplýsast kann, at Hoyvíkar kirkja og Samkoman Lívdin hava keypt grundstykkir frá Tórshavnar kommunu fyri kr. 156,00 fermeturin.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin mælir til at kommunan í sambandi við eina møguliga sølu av lendinum, fær ávirkan á endaliga útsjónd og staðseting av kirkjuni.

**Fíggjarnevndin 2. september 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at selja kirkjuráðnum á Argjum áleið 4000 fermetrar av økinum millum Støðlagøtu og Sandá oman fyri Spinnaríið, sambært forskjalið 2006-0769, dagfest 1. august 2008, fyri kr. 156,- fermeturin.

**Býráðið 11. september 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Ì november 2008 var umsókn send Umhvørvisstovuni um at frábýta 4.000 $m^2$ av økinum millum Støðlagøtu og Sandá til at byggja kirkju á.

Við tí grundgeving, at økið liggur í D1-øki (*almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt*), ið eftir teirra meting skal liggja sum grønt øki, noktaði Umhvørvisstovan at frábýta grundøki til kirkju her, og mælti til at kommunan ger eina serstaka byggisamtykt fyri økið.

Hendan avgerðin hjá Umhvørvisstovuni bleiv um ársskiftið 2008/2009 kærd til Kærunevndina í lendismálum.

Málið hevur síðani verið viðgjørt í Kærunevndini í lendismálum til seinast í oktober í 2009 tá skriv kom frá Føroya kærustovni um at nevndin hevði staðfest avgerðina hjá Umhvørvisstovuni.

Á fundi 18. februar 2010, í fundarhølinum hjá borgarstjóranum, við luttøku av m.ø. borgarstjóranum, kommunustjóranum, tekniska stjóranum og trivnaðar stjóranum, var avgjørt at leggja mál fyri byggi- og býarskipanarnevndina um broyting av ásetingunum fyri D1-øki í kap. IV, §22 í almennu byggisamtyktini soleiðis at byggjast kann á D1-øki sambært serstakari byggisamtykt og at gera eina serstaka byggisamtykt fyri øki, sum heimilar bygging av kirkju á økinum.

Í galdandi almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu sær kap. IV, §22 soleiðis út:

**<u>“§ 22. Ásetingar fyri umráðispartar D í 3. Grundumráði</u>**

1. Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstaka byggisamtykt fyri økið.

2. Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

3. Umráðispartarnir D3 verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.

4. Byggistigið og nettonýtslustigið mugu, innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, ikki fara upp um ávikavist 0,25 og 0,30.

5. Útstykking innan fyri ein umráðispart verður einans loyvd, um hon hóskar til byggiskipan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri ein náttúrliga avmarkaðan lut av umráðispartinum."

Umsitingin mælir til, at soljóðandi nýtt stk. 2 verður sett inn:

2. Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt um tað er í samsvari við stk. 1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at ásetingarnar í kap. IV, §22 í almennu byggisamtyktini verða broyttar soleiðis at nýtt stk. 2 verður sett inn og kap. IV, §22 kemur at síggja soleiðis út.

**<u>§ 22. Ásetingar fyri umráðispartar D í 3. Grundumráði</u>**

1. Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstaka byggisamtykt fyri økið.

2. Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt um tað er í samsvari við stk. 1.

3. Umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.

4. Umráðispartarnir D3 verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.

5. Byggistigið og nettonýtslustigið mugu, innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, ikki fara upp um ávikavist 0,25 og 0,30.

6. Útstykking innan fyri ein umráðispart verður einans loyvd, um hon hóskar til byggiskipan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri ein náttúrliga avmarkaðan lut av umráðispartinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 18. mars 2010:** Einmælt samtykt.

**46/10** **2010-0426**

**Serstøk byggisamtykt fyri økið til kirkju á Argjum**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Í februar 2006 kom fyrispurningur frá kirkjuráðnum á Argjum um at finna eitt øki til at byggja nýggja kirkju á Argjum. (mál nr. 2006-0769).

Umsitingin gjørdi eitt uppskot um staðseting av kirkjuni millum Støðlagøtu og Sandá oman fyri Spinnaríið, sum var samtykt av byggi- og býarskipanarnevndini.

Av tí at økið liggur tætt við Sandá, var søkt um undantaksloyvi frá friðingarmyndugleikunum til at byggja her.

Ì november 2008 var umsókn send Umhvørvisstovuni um at frábýta 4.000 $m^2$ av økinum millum Støðlagøtu og Sandá til at byggja kirkju á.

Við tí grundgeving, at øki liggur í D1-øki (*almenning, náttúrufriðingar-og mentunarlig endamál og tílíkt*), ið eftir teirra meting skal liggja sum grønt øki, noktaði Umhvørvisstovan at frábýta grundøki til kirkju her, og mælti til at kommunan ger eina serstaka byggisamtykt fyri økið.

Málið hevur síðani verið viðgjørt í Kærunevndini í lendismálum, sum staðfesti avgerðina hjá Umhvørvisstovuni.

Á fundi 18. februar 2010, í fundarhølinum hjá borgarstjóranum, við luttøku av m.ø. borgarstjóranum, kommunustjóranum, tekniska stjóranum og trivnaðar stjóranum, var avgjørt at leggja mál fyri byggi- og býarskipanarnevndina um broyting av ásetingunum fyri D1-øki í kap. IV, §22 í almennu byggisamtyktini, soleiðis at byggjast kann á D1-øki sambært serstakari byggisamtykt og at gera eina serstaka byggisamtykt fyri øki, sum heimilar bygging av kirkju á økinum.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið til nýggja kirkju á Argjum við grundarlagi í teimum tekningunum, sum vóru gjørdar í sambandi við uppskotinum til staðseting av kirkjuni. (mál nr. 2006-0769).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri økið til nýggja kirkju á Argjum verður góðkent.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 18. mars 2010:** Einmælt samtykt.

**47/10** **<u>2008-4022</u>**

**<u>Umsókn frá P/F Føroya Egg á Velbstað v/Annfinn Brekkstein um at byggisamtyktin fyri matr. nr. 51b, Velbastað verður broytt frá J-øki til C-vinnuøki.</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Ognin matr. nr. 51b, Velbastað er 3056 m$^2$ og liggur í J-øki til bóndahús, sum í byggisamtyktini fyri Velbastað er útlagt til djórahald og jarðabrúk. Ognin er partur av festinum hjá Jóhan Petur Brekkstein.

Sambært umsóknini er virkið ikki kappingarført á marknaðinum. Hetta hevur við sær, at eigarinir eru noyddir at hugsa um onnur alternativ, fyri at gagnnýta virkið optimalt.

Av tí at J-øki hevur sera avmarkaðar møguleikar ynskir eigarin at byggisamtyktin verður broytt soleiðis at ognin verður c-vinnuøki.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at at málið verður sent Búnaðarstovuni til hoyringar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. oktober 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Búnaðarstovan hevur nú viðgjørt umsóknina, eftir at festarin hevur havt hana til viðmerkingar.

Boðað verður frá í skrivi, dagf. 24. november 2009, at Búnaðarstovan onki hevur ímóti at byggisamtyktin fyri økið verður broytt til C-vinnuøki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri Velbastað verður broytt soleiðis, at ognin matr. nr. 51b, Velbastað, 3056 m$^2$ til støddar, verður broytt frá J-øki (bóndahús) til C-vinnuøki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 18. mars 2010:** Einmælt samtykt.

**FUNDUR LOKIN KL. 18.50**

| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**18. mars 2010** | Blað nr.:<br>**8460** |
| | Formansins merki: |

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Maria H. Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |